DAGSINS MEINING

Forsætisráðharravitjan

Í dag kemur forsætisráðharrin til Føroya á almenna vitjan. Tað má sigast at vera sjálvsagt, at forsætisráðharrin í ríkisfelagsskapinum vitjar í Føroyum og í Grønlandi so av og á. Ríkisfelagsskapur er samansettur av trimum tjóðum, sum í princippinum eru javnlíkar. Ein felagsskapur millum javnlíkar tjóðir má byggja á sínamillum virðing og javnvág.

Hinvegin er tað væl eingin, sum sigur, at ríkisfelagsskapurin heldur í allar ævir. Ríkisfelagsskapurin heldur so leingi allar tríggjar tjóðir hava áhuga í at varðveita hann. Hesin áhugi snýr seg ikki bert um politikk og heildarveitingar. Hesin áhugi snýr seg eisini um at varðveita søgulig og persónlig bond. Túsundtals føroyingar og grønlendingar hava sett búgv í Danmark. Í Danmark eru landsmenn okkara væl fagnaðir og her hava hesir landsmenn okkara skapað sær eina góða og trygga tilveru. Hesir føroyingar vilja, hóast teir hava valt eitt nýtt føðiland, varðveita sambandið við røturnarnar – gamla føðilandið Føroyar. Ættarfólk teirra her heima í Føroyum ynskja tað sama. Hetta er bæði náturligt, rætt og rímuligt. Ríkisfelagsskapurin hevur sostatt eisini nakað við kenslur at gera, og stjórnirnar í øllum trimum londum hava eina stóra ábyrgd av hesari síðuni av felagsskapinum.

Men ríkisfelagsskapurin hevur mest av øllum við politikk at gera. Forsætisráðharrin og stjórn hansara eru saman við landsstýrissamgonguni við yvirtøkum og minkandi blokki farin inn á heimastýrisgøtuna fram móti fullum føroyskum sjálvstýri. Í Føroyum er í grundini eingin ósemja um hesa leið. Ósemjan er um ferðina, um raðfestingarnar og um prísin fyri ta leið, við samgonga og forsætisráðharrin hava valt.

Millum forsætisráðharran og løgmann eru ikki álvarsamir trupulleikar. Teir eru samdir um góðan gamaldags borgarligan politikk, um kríggið í Irak og um hvønn leiklut Føroyar skulu hava í ríksfelagsskapinum. Við hesum baksýni er vitjunarløtan ivaleyst væl vald. Hetta merkir tó ikki, at tað ikki eru trupulleikar at umræða undir vitjanini. Vit kunnu minna á hernaðarlógirnar, flogvøllin og altjóða hvalaveiðisamstarvið innan IWC. Aðrir stórir spurningar sum fullur føroyskur limaskapur í Norðurlanda Ráðnum, NATO eins og ES-spurningurin eru komnir á donsk-føroysku dagskránna. Sostatt er nóg mikið at tosa um hjá forsætisráðharra og løgmanni. Men fyrst og fremst fara forsætisráðharrin og frúa hans at njóta góðan føroyskan blíðskap, føroysku náttúruna og føroyska mentan. Forsætismálaráðharrin og kona hansara skulu vera hjartaliga vælkomin til okkara vakra land og blíða fólk.Vit vóna, at tey fáa nakrar góðar og ógloymandi dagar her, so tey, tá tey venda heimaftur til Danmarkar hava eina góða og positiva mynd av okkum føroyingum og landi okkara.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Så får i ikke mere for det 25 øre…

Hergeir Staksberg

Herfyri var eg inni á gólvinum hjá Mylnuni. Eg fór á vitjan fyri at keypa mjólk, men tá eg so kom yvir til mjólkina, sum neytini so fitt høvdu donerað til Føroya fólk, sá eg at prísurin var farin upp. Mjólkin kostaði nú 10,10 kr. Fyrst helt eg tað vera tápuligt at seta ein slíkan prís, men so á veg til kassan, fór eg at filosofera um hesa vælsignaðu kúnna, sum hevði verið mjólkadonor til gagn fyri meg, og tannið hevði sett prísin upp. Eg keypti bert henda eina pakkan, og tí slapp eg við at gjalda 10 kr., av tí at 10,10 kr. verður rundað av til 10 kr. , MEN um onkur keypir tveir pakkar av neytadonatión, so fer prísurin upp á 20,20 kr. og runda vit tað, so verður upphæddin, ið skal gjaldast 20,25 kr., og t.v.s., at so hevur handilsmaðurin fortjent sær 25 oyru eyka. Her eru góð ráð ikki so dýr, tí fyri tey, ið føla seg snýttan fyri eitt 25 oyra, er ein loysn. Fyri at sleppast skal undan hesum eyka 25 oyrunum í »meirvirðisgjaldi«, tá ið mann skal keypa tveir ella fleiri pakkar av mjólk, so kann mann í staðin taka tveir (ella fleiri) pakkar við til diskin, men bert gjalda fyri ein í senn, og harvið spara eitt 25 oyra. So um onkur hevur hug til at spara eitt 25 oyra næstu ferð, ið ein fer handils at keypa mjólk, so kunnu tit brúka hendan »frymilin« og harvið kunnu tit snýta handilsmannin fyri eitt 25 oyra og ikki mótsatt.

Jorsalsferðin viðvíkjandi hoyrilíkindum á fjarleiðum

Niklái Petersen,
løgtingsmaður

Undir umrøðuni av ólavsøkurøðu løgmans 6. august 2002 setti eg landstýrismanninum í vinnumálum spurningin, hvussu tað var við møguleikunum at hoyra útvarpið á fjarleiðum, hvar nógvir føroyskir sjómenn eru í vinnu alt árið runt.

Upplyst varð, at arbeitt varð við málinum og at ein ein nevnd sat og gjørdi eitt upplegg til landstýrismennirnar í mentamálum og vinnumálum soleiðis at støða kundi takast til at fáa hoyrilíkindini hjá Útvarpi Føroya nøktandi á fjarleiðum.

Í skrivligum fyrispurningi reistur 28. august í 2002 var spurt hvør mannaði hesa nevnd, og um ikki møguleikar vóru fyri eini fyribilsloysni, meðan nevndin sat og arbeiddi.

Nevndin, ið m.a. skal geva tilmæli um útvarpshoyrilíkindir á fjarleiðum er mannað við: einum umboði frá Mentamálaráðnum – einum umboði úr Vinnumálaráðnum – einum umboði frá Fjarskiftiseftirlitinum – einum umboði frá Útvarpi Føroya og einum umboði frá Sjónvarpi Føroya.

Mett var tá, at arbeiðið hjá nevndini skuldi verða greitt úr hondum í seinasta lagi 1. mai í ár.og eitt tilmælið tá skuldi fyriliggja til landstýrismannin, at taka støðu til.

Ein fyribilsloysn kundi verið, at leiga seg inn á kortbylgjusendinetið, hjá eitt nú íslendarum á Guvunesi og harvið nøkta tørvin á Flemish Kap, í Canada, Vesturgrønlandi, Eysturgrønlandi og Svalbard/Barentshavið, ein góð og rættuliga bílig loysn, sum hevði kosta umleið 2 ársverk, eftir upplýsningum í tá fyrilógu.

Landstýrismaðurin í vinnumálum metti ikki rætt, at ein fyribils loysn verð gjørd út frá tí grundgeving, at tað kann verða óheppið at gera íløgu í ávísa loysn, áðrenn kannað er hvør loysnin er best hóskandi í mun til kostnað og tørv.

Landsstýrismaðurin metti málið hava týdning og ynskti at nevndin gjørdi sítt arbeiðið liðugt, soleiðis at betri grundarlag var fyri eini støðutakan.

Tíðin gongur og enn er onki komið frá nevndini, havi latið mær fortalt, at nevndin ongan fund hevur havt síðani einaferð í februar.

Um so er, kann hetta mál ongantíð loysast, og niðurstøðan má verða tann, at sera lítið forstáðilsi fæst og sera lítil virðing fyri tí sigldandi fólkinum fæst frá landstýrinum.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Altjóða arbeiðsskapandi verkætlan

Hans Birgir Hansen

Fyri nøkrum árum síðani, var ein alment frammi í bløðum við altjóða arbeiðsskapandi verkætlan, ið skuldi skapa altjóða fortreytir, grundarlagi!

Tað vil siga at kunna byrja altjóða forrætning, handil, keyp og sølu sum óheftur sjálvstøðugur distributørur, við skipa heimarbeiði, úti um landið! Tað ber væl til at skapa millióna fyritøku, uttan tapsvanda, og uttan lántøku í banka, sparikassa, figgingarstovnar, slíkir vilja ikki stuðla við startkapitali! Tað er sett gongd á at fáa broytingar av drykkju-, etingar-, lívs-, nýtslu-, innkeypsvanar og hugsjónir, hugburðir, atburðir, málburðir v.m. Eg kann siga, at áðurnevndu broytingar og tað at gerast seriøs, virkisfús, motiverað í samskifti og samstarvi, vil skapa altjóða møguleikar! Tað, at ein í túsundtals lesarabrævum seinastu mongu árini, greiddi frá slíkum hevur skapt altjóða fyritreytir og grundarlag í Føroyum! Eg eri ein íverksetari, ið við hjálp frá bløðum, fái út boðskapir, so fólk kunnu skipa seg sjálvstøðugt vinnurekandi heimaífrá!

Tað, at skapa altjóða samskiftis og samstarvsmøguleikar, var partur av hesi altjóða arbeiðsskapandi verkætlan, ið nú hevur virka í fleiri ár!

Eg síggi støðuga framgongd hjá teimum, ið eru komin millum fremstu sølufólk í Danmark, so tað vera seldar vørur frá fleirtjóða fyritøkum!

Tað krevst ikki tann stóri startkapitalur til at byrja eina millióna fyritøku úti um landið ið ein fæst við at kunna áhugaði í tí dagliga í Havnini!

P. S. Fleiri hjún og einstøk fáast við slíkt úti um landið!

Lærarar skulu gjalda heimsins besta skúla

Andras L. Samuelsen

Avleiðingarnar av at Høgni Hoydal einvegis setir uppskotið um ársverk í gildi og proklamerar, at nú fáa vit heimsins besta skúla, er ábyrgdareysur politikkur, tí at uppskotið fær lærararnar at krevja endurgjald fyri økingina av arbeiðstímunum á skúlanum, millum 26 og 33 túsund krónur. Alternativið má vera, at Høgni Hoydal áleggur lærarunum at gjalda fyri heimsins besta skúla.

Tá ið Norðurlondini fóru at umskipa arbeiðstíðina hjá lærarunum, var tað í tøttum samstarvi við lærarafeløgini, og eitt nú í Svoríki og Íslandi hækkaði lønin munandi, afturfyri at fara yvir til nýggja skipan. Somuleiðis vóru uratkvøðurnar hjá feløgunum galdandi fyri báðar partar.

Føroyar bjóða sínum lærarum at arbeiða 200 tímar á skúlanum fleiri enn í dag og tað fyri somu løn, tá ið farið verður yvir til hesa nýggju skipan og góðtaka ikki eina uratkvøðu hjá lærarunum sum skulu arbeiða eftir hesi skipan.

Við einvegis at seta hetta uppskot til ársverk í gildi, sum lærarar ikki góðtaka, er Høgni Hoydal í ferð við at niðurbróta stóran part av tí, sum Føroya Lærarafelag, við samráðingum, hevur uppbygt, síðan tað fekk samráðingarrættin í 1972.

Høgni Hoydal sigur við fjølmiðlarnar, at Føroya Lærarafelag hevur verið við til at gjørt uppskotið um ársverk.

Tá ið Føroya Lærarafelag er við til at gera broytingar í tíð og løn, so eitur tað samráðingar. Her er ikki talan um samráðingar, men at felagið hevur havt tveir limir í einari arbeiðsnevnd upp á fimm, har Fíggjarmálaráðið og Mentamálaráðið alla tíðina hava sett skránna og hava við sínum vetolíknandi fundarluttøku avvíst krøv frá felagnum. Hetta fær Høgni Hoydal til, at Føroya Lærarafelag hevur gingið við til hetta uppskotið.

Føroya Lærarafelag hevur góðtikið, at landsstýrismaðurin kann seta eina nýggja skipan í verk. Tað kann hann sambært leiðslurættinum, óansæð um Føroya Lærarafelag skrivar undir hetta ella ikki.

Men tá ið tað snýr seg um vavið á arbeiðstíðini, skal tað ganga fyri seg við samráðingum, tí tíð og løn kunnu jú ikki haldast atskild.

Leiðslan í Føroya Lærarafelag, nevndin, hevur ikki verið við til at evna uppskotið og hevur heldur ikki góðtikið tað. Limirnir eru kunnaðir og hava, við uratkvøðu, vrakað tað.

Hóast hetta trumfar Høgni Hoydal uppskotið ígjøgnum og slær allar atfinningar upp í glens og tosar um, at lærarar hava fingið kaldar føtur.

Her er als ikki talan um at vera ímóti einari, av landsstýrinum pátvingaðari, skipan, men eitt álvarsamt mótmæli um at landsstýrismaðurin, sum undanfarsla fyri eini nýggjari skipan, einvegis áleggur lærarum 200 tímar afturat á skúlanum.

At tosa um at fáa heimsins besta skúla, við at økja arbeiðstíðina á skúlanum 16 - 18 %, uttan at hækka lønina tilsvarandi, minnir mest av øllum um lond sum ikki hava fólkaræði og so als ikki um Norðurlond, sum eru kend fyri, at samráðingar skulu enda við konsensus.

Føroya Lærarafelag hevur víst góðan vilja í fleiri stórmálum, men hevur ikki uttan bit og slit fingið nakrar sømdir.

Føroya Lærarafelag fór eina mánaðarløn niður í 1993 og er lønin enn ikki komin fyri seg eftir lønarsteðgslógina, tekur tú virðisminkingina við.

Føroya Lærarafelag gekk við til, av tí at tað var eitt ultimatum, at arbeiðstíðin varð skipað sum ársverk samstundis sum felagið fekk ávirkan á hetta, men her hava Fíggjar- og Mentamálaráðið gjørt einvegis ásetingar, tá ið tímar og minuttir skuldu ásetast.

Føroya Lærarafelag gekk eisini við til høvuðsavtalu; hetta var somuleiðis eitt ultimatum fyri at fáa sáttmálasetan fyri lærarar. Har stendur m.a.:

§2.: Partarnir eru á einum máli um at fremja gott samstarv.

§5.: Partarnir eru samdir um, at lønar- og onnur setanarviðurskifti eiga at verða ásett í felags sáttmálum partanna millum.

Í øllum hesum stórmálum hevur landsstýrið svikið Føroya Lærarafelag. Hvussu skulu vit hava álit á at vit fáa gjørt nakrar sum helst broytingar í ársverkinum undir royndartíðini?

Heldur átti landsstýrið, í góðum samstarvi við lærararnar, at tryggja sær, at Føroyar fáa heimsins besta skúla; men tað gerst ikki við at kroysta eina illa umhugsaða, ikki lidna og ikki, av brúkaranum, góðtikna skipan oman yvir lærararnar. Nú er stórur vandi fyri, at lærarar verða misnøgdir frameftir, og teir sum hava møguleika fyri tí, fara at rýma úr skúlanum.Úrslitið verður sostatt kanska tað mótsetta av tí ætlanin við ársverkinum upprunaliga var.

Ættarstevna í Skopun

Leygardagin 26. juli verður stevna fyri ættini hjá Tummas Thorsvig í Skopun

ÆTTARSTEVNA
Tíðindaskriv

Tummas Thorsvig var ættaður úr Hósvík, flutti til Skopunar sum ungur og giftist Paulinu Petersen úr Klaksvík.

Tummas og Paulina fingu hesi børnini: Johannes Otto Mittelstein, Skopun, Helena Mohr, Vágur, Dagmar Johansen, Tórshavn, Valborg Weihe, Selatrað og Jona Joensen, Hvítanes.

Paulina doyði á ungum árum, og Tummas giftist uppaftur við Abreu Jakobsen.

Tummas og Abrea fingu hesi børnini: Lina Thomassen, Sørvágur, Tóra Lið, Sørvágur, Aslaug Carlsen, Tórshavn, Sjúrður Thorsvig, Selatrað, Sámal Thorsvig, Danmark, Elsebeth Johanna Davidsen, Sørvágur.

Abrea átti í fyrru giftu síni við Samuel Fredrik Jakobsen hesi børnini: Herluf Jakobsen, Skopun, Simonu Johannesen, Tórshavn, Solfrid Lucassen, Skopun.

Allir eftirkomarar hjá omanfyrinevndu - við makum og børnum - verða boðin við til stevnuna.

Ætlanin er at byrja stevnuna fríggjakvøldið 25. juli í Hósvík, har m.a. verður møguleiki fyri at síggja barnaheimið hjá Tummasi. Møtt verður í bygdarhúsinum í Hósvík kl 17.

Upplýsast skal, at møguligt er at sleppa til Skopunar við Teistanum kl 21.00 fríggjakvøldið. Annars er fyrsti túrur hjá Teistanum leygarmorgunin kl. 8.45 av Gomlurætt.

Leygardagin verður bygdarhúsið Samljóð í Skopun karmur um stevnuna. Kl. 10 um morgunin verður kunnað um skránna fyri dagin. M. a. verður skipað fyri gongutúri, útferð við báti – um viðrar - og rundvísing í bygdini. Møguleiki verður eisini fyri at fáa okkurt til matna.

Kl. 19.00 verður veitsla í Samljóð. Tey, ið ikki ætla at gista á Sandoynni, hava møguleika at sleppa til Gomlurætt um midnáttina leygarkvøldið. Hesi vera vinarliga biðin um at siga frá hjá onkrum av niðanfyrinevndu stigtakarum.

Sunnudagin verður farið í kirkju í Skopun kl. 12.00. Ættarfaðirin, Tummas Thorsvig, var klokkari í Skopunar kirkju í góð 40 ár. Áðrenn farið verður hvør til sítt, møtast vit aftan á kirkjugongdina í bygdarhúsinum, har møguleiki verður fyri ábiti.

Nógv hava longu meldað til stevnuna, men um fleiri eru, ið ætla sær við, so er enn møguleiki at melda til hjá Eyðvør Dam, Húsavík, fax. 361777/ tlf. 361061. Tilmeldingarfreistin er longd til 1. juli.

Um tit liggja inni við myndum ella øðrum áhugaverdum tilfari, so setið tykkum í samband við onkran av niðanfyrinevndu stigtakarum. Eru aðrir spurningar ella vilja tit hava endaligu skránna senda, so kunnu tit eisini nýta E-mail adressuna thorsvig2003@hotmail.com

Vegna stigtakararnar
Símun Hansen tlf 316884
Bjarki Mohr 319212
Guðny Simonsen 314837
Herluf Jakobsen 310618
Heðin Augustinussen 227026
Eisenbjørg Clementsen 361583
Ásbjørg Davidsen 332235